RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD
The Faroese Road Safety Council

10. apríl 2024

Att: Vinnunevnd Løgtingsins

Viðmerkingar til broytingaruppskot til ferðslulógina um rúsevnakoyring

Heilt yvirskipað tekur Ráðið fyri Ferðslutrygd undir við broytingaruppskotinum. At koyra rúsað/ur – við rúsdrekka ella rúsevnum, er vandamikið og tí eigur tað ikki at koma fyri. Tað er vandamikið í bili, men sanniliga eisini á øðrum flutningsførum, t.d. prutli og súkklu. Við verandi lóggávu er null-toleransa fyri rúsevni, men ongin differentiering í revsingini. So tú verður revsað/ur eins hart/veikt óansæð hvussu nógv rúsevni tú hevur tikið.

Uppskotið til differentiering í revsing fyri THC (hash) fylgir ásetingunum, sum verða brúktar í Danmark og leggja seg upp at differentieringini í revsing fyri rúsdrekkakoyring. Hetta taka vit undir við í RFF.

Vert er at viðmerkja, at revsingin fyri rúsevniskoyring annars, er generelt lægri enn í DK.
Har verður rúsevniskoyring revsað sum um talan var um promillu á 1,21. Tí eigur í øðrum lagi at verða tikið stig til at hyggja eftir revsirammuni fyri rúsevniskoyring sum heild.

Eisini er neyðugt at viðmerkja, at tað eru feilir í upplýsingum um revsing fyri rúskoyring á heimasíðuni hjá RFF. Hetta verður rættað skjótast gjørligt. Niðanfyri eru galdandi ásetingar fyri rúsevniskoyring í Føroyum, soleiðis sum tað átti at staðið á heimasíðu okkara:

1. ferð: missir koyrikort í 6mðr treytaleyst + hálva nettománaðarløn í bót

2. ferð: missir koyrikort treytaleyst 1 ár + 1 nettománaðarløn í bót

3. ferð: missir koyrikort treytaleyst í 3 ár + 10 dagar treytaða fongsulsrevsing (samfelagstænastu)

Tá talan er um rúsdrekkakoyring er frádømingartíðin treytað av promilluni (soleiðis sum eisini verður lagt upp til at gera fyri THC). Alt frá treytaðari frádøming (millum 0,2-0,5), 1 ára frádøming (frá 0,51), 3 ára frádøming (frá 1,21) og promilla hægri enn 0,2 kann geva fongsul. (Og sjálvandi at straffur fyri endurtøku av sama brotið gevur tilsvarandi hægri revsing.)

Eitt sindur trupult er at finna neyv hagtøl úr føroysku skipanini hjá Politinum. Tað verður vónandi lættari at trekkja tøl úr nýggju skipanini (polsas), tá hon fer at virka. Men generelt kann sigast, at talið á teimum, sum verða sektað fyri rúsevniskoyring í Føroyum er vaksandi. Tíbetur eru tølini fyri

RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD
The Faroese Road Safety Council

rúsevniskoyring, har talan er um óhapp sera smá. Ringt er at síggja ein egentligan tendens av somu orsøk, men í takt við at tað verður lættari at staðfesta, nær talan er um rúsevniskoyring, og at meiri fokus verður á at kanna hetta, fer at verða gjørligt at staðfesta hesa gongd.
Í ferðslutrygdarætlanini fyri Føroyar eru hagtøl fyri rúsdrekka- og rúsevniskoyring.
Her sæst at tað í størri mun henda ferðsluóhapp við rúsdrekka, enn við rúsevnum, men tølini eru aftur her generelt nokkso smá.

Mynd 11: Óhapp orsakað av rúsdrekka, rúsevnum ella heilivági

	2010	2011	2012	2013	2014	2015	2016	2017
Rúsdrekka uttan fólkaskaða	10	25	30	22	16	17	21	11
Rúsdrekka við fólkaskaða	4	3	1	4	6	4	3	6
Heilivágur/rúsevni uttan fólkaskaða	3	0	0	1	3	0	3	4
Heilivágur/rúsevni við fólkaskaða	0	1	0	1	2	0	0	0

Tað er tíbetur eydnast at fáa til vega tøl frá 2018 til d.d. fyri rúsevniskoyring. Her eru tølini býtt upp uppá politiskrásett óhapp við og uttan fólkaskaða, og eisini tey, sum eru sektaði fyri rúsevniskoyring, tó uttan at hava gjørt eitt óhapp.

Havast má tó í huga, at sama mál kann hava bæði rúsevni- og rúsdrekka íblandað, og tí kunnu rúsevnismál verða skrásett undir rúsdrekkamáli. Tí kann talan vera um ávís skuggatøl. Til tess at finna heilt neyvu tølini, má farast niður í einkultu politirapportirnar, og tað hevur ikki verið gjørligt til hetta høvið.

	2018	2019	2020	2021	2022	2023	2024
Rúsevniskoyring	12	30	22	14	25	34	16
FUH uttan persón skaða	0	5	5	4	6	3	0
FUH við persón skaða	0	1	0	0	1	1	0

Í Danmark vita vit tó eitt sindur meiri um rákið við rúsevniskoyring.

Donsk tøl siga, at síðani 2017 eru fleiri bilførarar revsaðir fyri rúsevniskoyring, enn fyri rúsdrekkakoyring!

RÁÐIÐ FYRI FERÐSLUTRYGD
The Faroese Road Safety Council

Í 2023 vóru 6.088 revsaði fyri rúsdrekkakoyring í Danmark. Meðan 8.526 vóru revsaði fyri rúsevniskoyring!

Donsku myndugleikarnir tora tó ikki at siga, at orsøkin er, at fleiri narkobilistar eru á vegunum. Partur av frágreiðingini er eisini, at møguleikarnir at testa eru blivnir betri…..

Hinvegin eru tað framvegis rúsdrekkabilistar sum dominera vanlukku-hagtølini.

Tøl úr Fyns politikreds fyri 2023 siga sostatt at tað vóru 23 rúsdrekkarelatera ferðsluóhapp við fólkaskaða, mótvegis 8 rúsevnisrelateraðum. Fyri óhapp uttan fólkaskaða er rákið tað sama, men enn greiðari á ávikavíst 128 og 25.

Blíðar heilsanir
Ráðið fyri Ferðslutrygd

Lovisa Petersen Glerfoss, stjóri